# B68 kendi ikki sína vitjunartíð

**VODAFONEDELIDIN**

**Toftamenn hava bert sær sjálvum at takka fyri at sigurin glapp teimum úr hondum, tá teir spældu javnleik 1-1 móti FC Suðuroy, sum eftir seks ósigrar á rað, ognaði sær eitt tiltrongt stig í bortnstríðnum**

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B68 | 1 |
| FC Suðuroy | 1 |




*Sterki senegalin á B68 miðvøllinum legði toftamenn á odda stutt fyri dystarlok, men gleðin var stokkut, tí Obi Charles javnaði fyri FC Suðuroy stutt aftaná.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er eingin ivi um at suðuroyingar eru nøgdir við at hava fingið eitt heppið stig í trupla útidystinum á Svangaskarði, og liðskiparin hjá suðuroyingum, Palli Augustinussen, var fegin um javnleikin.

– Tað var umráðandi hjá okkum at venda neiligu gongdini, og tað gjørdi vit við at fáa eitt fáa stig í dystinum móti B68, segði Palli Augustinussen eftir dystin.

Meðan suðuroyingar eru nøgdir við eina stigið, so kunnu toftamenn als ikki vera nøgdir við bert at fáa javnleik í einum dysti, har teir høvdu allar møguleikar at avgerða dystin. Men hóast fleiri góðar kjansir, so kendu toftamenn ikki sína vitjunartíð. Tískil var tað ein vónsvikin B68 liðskipari, sum aftaná dystin mátti ásanna, at avrikið hjá toftamonnum als ikki var nøktandi.

– Nei, hetta úrtlitið kunnu vit ikki vera nøgdir við. Vit koma fram til fleiri góðar kjansir, men neyvleikin manglaði í avgerðandi løtum. Men tá vit so fingu bóltin í málið, so klára vit ikki at binda um heilan fingur, og loyva suðuroyingum inn aftur í dystin segði Øssur Hansen.

### Misnýttu kjansirnir kostaðu dýrt

Eftir ein javnan fyrra hálvleik, har bæði liðini komu fram til nakrar kjansir, men tó uttan at skora, so kom meira ferð á spælið eftir steðgin. Ikki minst tí at Keita var skiftur inn í álopið hjá toftamonnum, og voldi hann verjuni hjá suðuroyingum trupulleikar. Við sínari styrki kláraði hann at halda uppá bóltin, og tað hevði við sær at meira strukturur kom í álopsspælið hjá toftamonnum.

Stutt eftir at Keita var innskiftir var tað um reppið at Øssur Hansen legði B68 á odda, eftir gott einmans avrik frá Keita í vinstru síðu, men skotið hjá veteraninum brast í stongina.

Hóast toftamenn høvdu fleiri kjansir, so smæddust suðuroyingar ikki burtur, og um heilt væl vildi til kundu teir lagt seg á odda, tá Dan Durhuus kom einsamallur móti málverjanun, men Vlada bjargaði skotroyndini.

Knapt 10 minuttir fyri dystarlok bragdaði loksins hjá toftamonnum, tá Ndende fekk sparkað bóltin í málið eftir trunkaspæl í brotsteiginum hjá suðuroyingum.

Men gleðin hjá toftamonnum var stokkut, tí løtu seinri høvdu suðuoyingar javnað, eftir at Obi Charles fekk sparkað bóltin í málið, eftir innlegg úr høgru síðu.

Fleiri mál komu ikki í dystinum, sum tískil endaði við javnleiki 1-1. Eitt úrslit sum toftamenn ikki kunnu brúka til nakað, meðan allur bati bøtur, hjá hart royndu suðuroyingunum.



*Liðskiparin hjá suðringum, Palli Austinussen var væl nøgdur við eina stigi á Toftum í gjár.*
*Mynd: Álvur Haraldsen, savnsmynd*

## Palli Augustinussen:

## Eitt týdningarmikið stig

Palli Augustinussen var væl nøgdur við eina stigið suðuroyingar fingu á Toftum sunnudagin.

– Tað kennist gott at hava fingið javnleik á Svangaskarði. Hóast vit ikki spæla ein góðan dysti, so eydnaðist tað við góðum liðavriki, og eitt sindur av heppni at fáa eina stigið í hús, segði Palli Augustinussen eftir dystin.

Spurdur um hvønn týdning javnleikurin hevur fyri suðuroyingar, metir Palli, at sum botnlið ræður um at skava so nógv stig saman sum tilber. Samstundis gevur javnleikurin móti B68 teimum trúnnu uppá at tað ber til, tí tað er hart at tapa fleiri dystir á rað.

Komandi vikuskifti skal FC Suðuroy spæla ein alt avgerðandi dyst, tá B71 kemur á vitjan, og Palli er avgjørdur í síni søk, tann dystin skulu vit vinna.